Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinir Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Lestrarpláss boðin út summarið 2025

Spurningar:

1. Hvussu nógv lestrarpláss verða boðin út summarið 2025 innan miðnáms-, yrkis- og hægri útbúgvingar?

Viðmerkingar:

Seinastu tíðina hevur verið nógv ljós varpað á lestrarumhvørvið í Føroyum, tá kjak hevur verið um, at ung fara av landinum at nema sær útbúgving.

Vit hava í Føroyum nógvar skúlar, ið bjóða útbúgvingar av alskyns slagi. Tær eru av ymsum slagi, og venda sær bæði til tann privata og almenna arbeiðsmarknaðin.

Tó kann tað altíð gerast betri í einari roynd at fáa útbúgvingar, ið bæði venda sær til eftirspurningin hjá arbeiðsmarknaðinum og teim lesandi. Tí kundi verið nærliggjandi at hugt at teimum útbúgvingum, vit hava í dag, og gjørt okkum greitt, um tær í nóg stóran mun nøkta tann eftirspurning, vit hava í dag.

Nú er fíggjarlógin samtykt, og greitt er, hvør játtanin er hjá teim ymsu skúlunum. Fyri at fáa greiðu á, hvussu nógv lestrarpláss verða boðin út í summar, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 16. januar 2025

Beinir Johannesen